# Jákup var púra kaldur



*– Tú kanst ætla, at eg havi verið sera spentur undan dystinum. Eg havi glett meg at sleppa at spæla aftur. Eg var eitt sindur nervøsur undan dystinum, men tá vit vóru komnir í búnarnar, og tað var klárt at fara á vøllin at hita upp, vóru tíbetur eingir trupulleikar at savna hugsanirnar fullkomuliga um uppgávuna, og eg var púra kaldur undir dystinum, sigur Jákup Mikkelsen úr Molde*

*Mynd: Kjell Langmyren*

**Jákup Mikkelsen helt seg ikki hava nakað serligt at gera, tá hann sunnukvøldið fyri fyrstu ferð umboðaði nýggja felagið**

Jákup Mikkelsen hevur fyri fyrstu ferð vart málið í einum øðrum útlendskum felagi enn Herfølge. Sunnukvøldið tóku hann og liðfelagarnir í Molde á einum fullsettum stadion ímóti Rosenborg.

Noreg er eitt velduga stórt land. Fjarstøðurnar eru stórar, og ferðingin til útidystirnar fer við nógvari tíð. Men hesa ferð var talan um grannadyst. Ferðalagið úr Tróndheimi var stórt, og lagið á regntunga og fullsetta stadion í Molde var fínt.

Nógv eygu vóru snarað ímóti føroyinginum ímillum stólparnar hjá heimaliðnum.

– Tú kanst ætla, at eg havi verið sera spentur undan dystinum. Eg havi glett meg at sleppa at spæla aftur. Eg var eitt sindur nervøsur undan dystinum, men tá vit vóru komnir í búnarnar, og tað var klárt at fara á vøllin at hita upp, vóru tíbetur eingir trupulleikar at savna hugsanirnar fullkomuliga um uppgávuna, og eg var púra kaldur undir dystinum, sigur Jákup Mikkelsen úr Molde.

Klokkan ellivu fyrrapartin í gjár hittust hann og liðfelagarnir aftur til venjingar. Teir venja aftur í dag, og í morgin fara teir út at ferðast.

– Mikukvøldið skulu vit spæla á útivølli í steypakappingini ímóti Bryne. Aftaná tann dystin fara vit beinleiðis í venjingarlegu tætt uttanfyri Oslo. Har skulu vit vera inntil sunnudagin. Tá skulu vit spæla landskappingardyst á útivølli ímóti Moss, greiðir Jákup Mikkelsen frá.

Eftir at Jákup Mikkelsen er fluttur til norskan fótbólt eru tað ivaleyst fleiri, sum fríska norsku landalæruna uppaftur. Moss er á eystara armi á Oslo fjørðinum – einar hundrað kilometrar sunnanfyri sjálvan høvuðsstaðin.

## Gott ummæli

Eftir dystarenda høvdu norsku fjølmiðlarnir stóran áhuga í føroyska landsliðsmálverjanum. Teir vildu vita, hvussu hann var nøgdur við avrikið í fyrsta dystinum fyri nýggja felagið, og um hann roknaði við, at Molde fór at verða framtíðar arbeiðsgevarin hjá honum.

– Eg haldi, at tað gekk sera væl hjá okkara liði. Vit spældu leingi væl, og í verjupartinum var stórur tryggleiki. Miðverjarnir báðir vóru skjótir, og teir megnaðu at halda mótstøðumonnunum so mikið langt burtur, at tað var millum lítið og einki at gera hjá mær, svaraði Jákup Mikkelsen millum annað tveimum útvarpsrásum og einari fjøld av umboðum fyri skrivaðu pressuna.

Tá tað snúði seg um at meta um sítt egna avrik, var Jákup – sær sjálvum líkur – ikki so orðaríkur:

– Hini mugu meta um, hvussu tað gekst hjá mær. Sjálvandi er tað hugaligt at hoyra venjaran siga, at hann var nøgdur. Um eg fari at halda fram í Molde er tað ov tíðliga at siga nakað um enn. Fyribils halda vit okkum til sáttmálan, sum sigur, at eg skal vera í Molde fram til vetrarsteðgin. Hvussu tað so verður, fáa vit at síggja, svaraði Jákup Mikkelsen, sum sunnukvøldið var partur í norðurlendskari trio í Molde miðverjuni. Annar av miðverjunum er svii, og hin er norðmaður.

Í norskum fjølmiðlum fær føroyski landsliðsmálverjin sum heild gott skoðsmál fyri fyrsta avrikið í Molde málinum. Romsdals Budstikke heldur, at tað er ov tíðliga at fella dóm yvir ein nýggjan málverja, eftir at bara ein dystur er spældur, men teir halda, at Jákup stóð seg væl.

Størsta norska dagblaðið, VG, gevur øllum spælarunum karakter. Í dystinum millum Molde og Rosenborg fekk ein av liðfeløgunum hjá Jákupi eitt sjey tal. Tveir fingu fýra, tríggir fingu seks og restin fekk fimm. Jákup var millum teir tríggjar, sum fekk eitt seks tal. Hetta var sama skoðsmálið, sum málverjin hjá Rosenborg fekk. Málverji hjá Rosenborg er Árni Gautur Arason. Hann er íslendskur landsliðsmálverji. Tá Ísland fyri tveimum árum síðani vann vinardyst 1–0 á Tórsvølli, var Birkir Kristinsson í málinum í 1. hálvleiki, meðan hesin Árni Gautur Arason var málverji í 2. hálvleiki. Tá var hann eykamálverji í Rosenborg. Nú hevur hann verið fyrsti málverji í eina tíð.

## Upp og niður

Einki er at taka seg aftur í, at tað, sum fór fram í 23. og í 24. minutti, hevði alstóran týdning fyri, hvussu spælið tók seg upp. Í 23. minutti stútaði Morten Knutsen eftir høgt innlegg úr høgru ímóti málinum. Jákup Mikkelsen var á veg út úr málinum, og við góðari refleks bjarging eydnaðist tað málverjanum at benda bóltinum burtur.

Í næsta álopinum spældi Molde seg ígjøgnum í vinstru síðu, bólturin varð frá baklinjuni lagdur flatt og eitt sindur aftureftir til André Schei Lindbæk, sum skoraði.

– Tá eg refleks bjargaði, var eg eitt sindur heppin. Eg var á veg út, tí eg roknaði í fyrstu atløgu við, at tað fór at bera til at boksa bóltin burtur, men so sá eg, at tað fór ikki at bera til. Tíbetur spældi tað væl av, staðfestir Jákup Mikkelsen.

Fýra minuttir frammanundan fyrsta málinum, fór eitt flatt innlegg úr vinstru framvið málverjanum, men tíbetur var eingin mótstøðumaður við handara stólpan. Onkur tíðindamaður metti hetta sum eitt mistak, men Jákup Mikkelsen er ikki samdur í hesum:

– Eg hevði møguleika at tveita meg út og royna at halda bóltinum. Men eftir at eg hevði staðfest, at eingin mótstøðumaður var við handara stólpan, valdi eg at lata bóltin fara. Eg metti, at vandin hevði verið størri, um eg tveitti meg, og so kanska bara hálvbjargaði.

Tá tað restaðu átta minuttir av 1. hálvleiki, javnaði Rosenborg. Talan var um hornasparksinnlegg úr vinstru, sum Erik Hoffmann rann fram í og stútaði upp um málverjan. Ein verjuspælari royndi at bjarga á strikuni, men linjudómarin markeraði fyri, at bólturin hevði verið innanfyri, og upptøkurnar vístu, at soleiðis var tað.

Norsku fjølmiðlarnir halda ikki, at Jákup Mikkelsen kundi lastast fyri útjavnandi málið.

Í 2. hálvleiki var Jákup tryggur, men eina ferð, tá tað leið ímóti endanum, var hann eitt sindur sjøtisleysur. Hann royndi við handara stólpan at halda einum høgum innleggi úr høgru, men hann misti bóltin, uttan at nakar vandi stóðst av.

– Í hasi støðuni átti at at havt hildið bóltinum. Tíbetur fekk mótstøðuliðið einki burturúr støðuni, ásannaði Jákup Mikkelsen.

**jh**



# Hýrurin var góður í Molde



*Teir í Molde iðraðu seg um at teir ikki vunnu dystin móti Rosenborg*

*Mynd: Kjell Langmyren*

**Men teir á heimaliðnum iðraðu seg kortini um, at teir ikki fingu øll stigini ímóti Rosenborg, sum ikki hevur vunnið seks tær seinastu ferðirnar**

Hóast dysturin varð sendur beinleiðis í NRK sjónvarpinum, so var tað fullsett, tá Molde og Jákup Mikkelsen sunnukvøldið tóku ímóti Rosenborg. Dysturin endaði 1–1. Tað var ikki so galið hjá Molde, sum ikki síðani 1992 hevði fingið stig á heimavølli ímóti níggju falda meistaraliðnum úr Tróndheimi.

Men hóast javnleikin, so iðraðu teir í Molde seg. Teir hildu, at teir høvdu havt møguleikarnar til at vinna øll stigini. Serliga iðraðu teir seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa mál tveir minuttir undan dystarenda. Men eftir innlegg úr høgru og aftur um aftara stólpan fór skotroyndin úr spískum dygst framvið handara stólpanum.

Dysturin var ferðmikil, intensiteturin var alla tíðina til staðar, og onkra løtuna var tað eisini dramatiskt. Í 2. hálvleiki fór ferðin eitt sindur niður. Molde legði størri dent á verjupartin tá, men Rosenborg megnaði ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar.

Hetta var sætti dysturin upp í slag, at Rosenborg ikki megnaði at vinna. Tað eru tveir mánaðir síðani, at teir vunnu. Síðani tá hava teir fimm ferðir spælt javnt, og eina ferð hava teir tapt.

Molde er nú føroyska felagið í norskum fótbólti. Inntil fyri stuttum var føroyski áhugin størstur fyri Sogndal. Nú er eingin føroyingur í Sogndal, men tað gongur væl hjá teimum. Sunnudagin megnaðu teir 1–1 á útivølli á tjóðarleikvøllinum Ullevaal í Oslo ímóti Lyn. Rune Bolseth legði eftir ellivu minuttir Sogndal á odda við brotssparki, men heimaliðið javnaði, tá 38 minuttir vóru farnir.

Sogndal hevur verið mett sum evni til niðurflyting, meðan Molde hevur verið roknað sum møguligt evni til heiðursmerkjapláss. Bæði feløgini eru nú miðskeiðis á stigatalvuni. Tað eru teir í Sogndal ivaleyst betri nøgdir við, enn teir í Molde eru. Eftir javnleikin í Molde halda teir framvegis, at møguleiki er fyri at røkka heiðursmerkjaplássi, men tað loyva vit okkum at ivast í.

Í toppinum í norskum fótbólti er Lillestrøm. Hesa ferð vunnu teir 7–4 á heimavølli ímóti Strømgodset, sum stríðist fyri at sleppa undan niðurflyting. Viking úr Stavanger er næstfremst. Hesa ferð vunnu teir 2–1 á heimavølli ímóti Moss, sum næstu ferð fer at taka ímóti Jákupi Mikkelsen og Molde.

Stabæk, sum er á triðja plássi, hølvaði botnliðið Bryne av 4–0. Brann Bergen vann 3–1 á heimavølli ímóti botnliðnum úr Tromsæ. Mest óvantaða úrslitið í Noregi hetta vikuskiftið var, tá Odd Greenland, sum hevur verið roknað ímillum møguligu avbjóðararnar hjá Rosenborg í NM stríðnum, legði rygg til 5–0 tap á heimavølli ímóti Bodø/Glimt, sum er fjórði niðast.

**jh**

